Tjaldur-Kyndil 26-27 (16-16):

# Endaðu sum teir byrjaðu

**Við at vinna á Tjaldri í næst seinasta dystinum tryggjaði Kyndil sær fjórða plássið á stigatalvuni**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Fyrsta liðið, sum hevur leikt allar sínar 24 dystir hetta kappingarárið er Tjaldur. Seinasti dysturin fyri teirra viðkomandi var á heimavølli móti Kyndli, sum í mangar mátar hevur havt eitt sera misjavnt kappingarár.

Byrjanin til hetta árið var júst í Runavík, og ta ferðina vann Kyndil við einum máli. Nakað sum annars skuldi vísa seg at gerast fyrri at bert tveimum sigrum í grundspælinum. Í endaspælinum hevur Kyndil í mangar mátar roynst væl drúgvari, og nú teir aftur vitjaðu í Runavík, eydnaðist teimum at endurtaka eitt máls sigurin á Tjaldri.

### Javnt allan vegin

Talan var alla tíðina um ein sera spennandi dyst hóskvøldið. Kanska var tað Kyndil, sum hevði nøsina framman fyri nevið hjá Tjaldri, men tó ongan tíð soleiðis, at nakar veruligur munur kom ímillum.

Eftir javnleik í hálvleikinum helt sama gongdin fram í seinna hálvleiki. Eitt skifti miðskeiðis í hesum var tað, sum um bæði liðini bara steðgaðu við at skora. Er tað nakað, sum er umráðandi í hondbólti, so er tað at avmarka hesar »deyðu«løturnar, og her var Kyndil stinnari hóskvøldið. Munurin varð øktur í trý mál, og tá Tjaldur stutt eftir fekk heilar tríggjar útvísingar á rað, tóktist alt vera avgjørt.

Kyndil megnaði tó ikki at binda ein veruligan knút á posabandið. Í øllum førum ikki soleiðis, at munurin varð øktur nakað, men nóg mikið at tryggja sigurin, varð hetta kortini. Tjaldur royndi seinastu løtuna at spjálka eitt sindur, og tað var eisini um reppi, at hetta eydnaðiast. Tvær ferðir innan seinasta minuttin tveittu teir hjá Kyndli bóltin burtur, men meðan Tjaldur skoraði fyrru ferðina, so gjørdist sending til seinasta kontrabóltin ov long, so so fekk Kyndil kortini sigurin.

### Væl nøgdir

Hóast hetta ikki seinasti dysturin hjá Kyndli, so merkti úrslitið, at teir nú hava tryggjað sær fjórða plássið á stigatalvuni. Tað mundi annars vera fáur, sum roknaði við hesum, tá endaspælið fór ígongd, og kyndilsvenjarin, Jónleif Sólsker, tykist eisini vera væl nøgdur um endastøðuna.

- Vit eru nøgdir. Tað er heilt víst. Ikki minst, tá hugsað verður um, at vit bara høvdu tvey stig, tá vit fóru undir endaspælið. Her hava vit tó fingið helmingin av stigunum, og hóast vit hava tapt hampuliga stórt móti onkrum av ovaru liðunum, so hava vit fingið tey stigini, sum vit skuldu hava.

Ikki minst eri eg fegin um, at vit eisini hava tikið okkum fram um fleiri av liðunum, sum hava nýtt nógvan pening til at styrkja um hópin. Sjálvir hava vit mest sum bara egnar leikarar, og tað gerst ikki minni gleðiligt av, at vit hesa ferð máttu vera bæði Bárð Johannesen og Janus Einar Sørensen fyri uttan, sigur Jónleif Sólsker at enda.

### Dysturin í tølum

**Tjaldur-Kyndil 26-27 (16-16)**

Málskjúttar:
Tjaldur: Mortan Hansen 7(4), Dragisa Stojovic 6, Sverri Justinussen 4, Hartvig Joensen 3, Jans Martin Knudsen 3, Zoran SXarcevic 2, Dan Thorleifsson 1
Kyndil: Høgni Klein 7(1), Josef Abrahamsen 5, Ken Zachariasen 4, Hans Andreas Dahl 4, Jónleif Sólsker 3, Regin Johannesen 3, Leif Mikkelsen 1
Brotskøst: Tjaldur 6, Kyndil 3
Útvísingar: Tjaldur 5, Kyndil 4
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sophus Dal-Christiansen.

# Sabotasja



*Halda teir, at hetta fer at eydnast teimum, so kenna teir ikki Heðin Mortensen, tí eg eri nógv treiskari enn so, sigur ÍSF-forsetin millum annað um tað, sum hóskvøldið varð ført fram í Fregnum*

**At ein maður, sum einki hevur við hvørki Føroyar ella føroyskan at gera, á miðjari nátt skal ringja til Russlands at spyrja hvørt Føroyar kunnu fáa Olympiska viðurkenning, heldur Heðin Mortensen vera ótrúliga langt úti. Hann heldur, at hetta bert kann vera við til at forða fyri drúgva arbeiðinum, sum ÍSF hevur framt í hesum sambandi**

OL-VIÐURKENNING
*Jákup Mørk*

Tá Fregnir hóskvødið komu á gøtuna, var ein av høvuðssøgunum, at tað undir ongum umstøðum fer at eydnast Føroyum at fáa altjóða Olypmiska viðurkenning. Blaðið hevur hesar upplýsingar frá varaforsetanum í altjoða olympisku nevndini, Vitalij G. Smirnov.

### Einki við ST at gera

At fáa olympiska viðurkenning hevur annars í nógv ár veirð eitt av aðalmálunum hjá ÍSF, og tá vit fríggjamorgunin fingu orðið á Heðin Mortensen, ÍSF-forseta, var hann ikki serliga blíður um tíðindini, sum Fregnir høvdu borið.

- Hatta er langt úti. Tað má eg bara siga. At ein maður, sum einki hevur við hvørki Føroyar ella føroyskan at gera, á miðjari nátt skal ringja til Russlands at spyrja ein slíkan spurning. Sjálvandi er svarið »njet« Smirnov hevur ikki ánilsi fyri, hvat tað er, sum spurt verður um, og hann spyur eisini aftaná, hvar Føroyar liggja.

Høvuðsorsøkin til, at Føroya ikki kunnu fáa olympiska viðurkenning, siga Fregnir vera, at vit ikki eru limir í ST, men heldur ikki hetta vil Heðin Mortensen góðtaka.

- Hetta er eitt arbeiði, sum er farið fram ígjøgnum nógv ár, og at hasir menninir nú fara at draga ST-limaskap og spurningin um fullveldi upp í málið, sigur bara, hvønn kunnleika teir hava til málið.

### Kann bert gera fortreð

Aðra staðni í blaðnum er skriv frá Heðini Mortensen og Anfinn Kalsberg um arbeiðið við at vinna Føroyum olympiska viðurkenning. Her verður millum annað víst á, at ein av treytunum fyri viðurkenningini er, at nóg nógv sersambond skulu hava altjóða góðkenning, og júst hetta leggur Heðin Mortensen eisinii stóran dent á.

- Vit eru í løtuni í ferð við at greiða limunum í olympisku nevndini frá, hvussu støðan hjá Føroyum er. At vit longu í nógv ár hava verið virkin á altjóða pallinum. At hópur av sersambondum longu hava altjóða góðkenning, og at fara soleiðis til verka, sum hesir menninir nú hava gjørt, er at blanda politikk upp í málið, og tað harmar meg almikið. Uttan at tað skal misskiljast, so kundu vit fyri tað tikið loysing í morgin, so tað er als ikki soleiðis, at hetta er tað sama sum at hvør lítil bygd í heiminum kann fáa olympiska viðurkenning.

- Hetta er jú eitt arbeiði, sum er farið fram tvørtur um flokspolitisk mørk, tí vit ynskja jú øll, at Føroyar kunnu fáa olympiska viðurkenning. Hvat motivið fyri hesum er, er ilt at siga, men tað kann so bara leggja fót fyri okkum, sigur ÍSF-forsetin, og leggur afturat.

- Men tað skal so ikki eydnast teimum. Halda teir tað, so kenna teir ikki Heðin Mortensen, tí eg eri nógv treiskari enn so. Og eg kann eisini siga, at halda hasir smádreingirnir á við hasum, so verður skriv sent til Smirnov, har vit greiða frá, at teir á ongan hátt umboða Føroyar ella føroyskan ítrótt í hesum høpi.

### Hava stuðul

Um arbeiðið, sum nú liggur fyri framman í hesum høpi, sigur Heðin Mortensen annars, at í summar skal eitt rættiliga umfatandi kunningarbeiði fara fram.

- Vit skulu nú tosa við hvønn einstakan lim í Olympisku nevndini, og greiða teimum frá, hvussu støðan hjá Føroyum er. Tí kann ein slíkur fyrispurningur til varaforsetan bara gera okkar støðu veikari, tí hevur hann fyrst sagt nei, so kann hann seinni hava trupult við at broyta svarið.

- Danski statsministarin hevur júst givið sín stuðul til kennar. Vit hava stuðul frá øllum Norðanlondum í hesum. Vit hava stuðul frá øllum Norðurevropa. Tað einsta staðið, har vit ikki tykjast hava fullan stuðul, er í Føroyum, og tað má eg siga er harmiligt.

- Eg kann bara siga tað, at um endin verður, at Føroyar ikki kunnu fáa Olympiska viðurekenning, so hava hasi fólkini fingið tað, sum tey ynsktu, og tað vildi verið ógvuliga beklagiligt, sigur ein alt annað enn blíður ÍSF-forseti at enda.



Vikuskifti

Nr. 53 • leygardagur • 16. mars 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Barnabókaútgáva hevur rættiliga vind í seglunum í løtuni

Lesið síðu 3






Ein leivd úr gamlari tíð:

# 362 ára gomul bók

**Ólavur Klakk í Klaksvík hevur eina heldur sjáldsama bók á bókahillini. Bókin er nevniliga frá 1640, og eitur Historie om det evige liv. Ólavur veit sjálvur ikki, hvaðani bókin kemur, men sjálvur hevur hann fingið hana frá abba sínum, O.F Joensen, ella Óla í Skúla, sum hann eisini varð kallaður**



*Ólavur Klakk í Klaksvík eigur eina 362 ára gamla andaktsbók. Hann hevur fingið hana frá abba sínum, men hvaðani hon upprunaliga kemur frá, veit hann ikki at siga*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

FORNMINNI
*Ingrid Bjarnastein*

Ein lutur er ikki antikkur fyrr hann er yvir 100 ára gamal. Bókin hjá Ólavi, Historie om det evige liv er útgivin í 1640, so hon kemur væl og virðiliga undir heitið antikvaritet.

–Eg veit ikki, hvaðani bókin kemur, sigur Ólavur Klakk. –Men hon hevur altíð verið í húsinum. Eg havi fingið hana frá abba mínum. O. F. Joensen, og hansara forbókstavir eru eisini prentaðir í bókina. Hvaðani abbi mín hevur fingið bókina, havi eg ikki hóming av.

O.F Joensen, ella Óli í Skúla, sum hann eisini varð róptur, sat á tingi fyri Sambandsflokkin í eini 30 ár. Hann var reiðari, átti handil, var riddari av Dannebrog, so tað var ikki bert ein og hvør, ið átti bókina undan Ólavi.

Bókin Historie om det evige liv fortelur tær, hvussu tú skalt liva fyri at sleppa í himmalin. Og um tú vilt vita nakað um bókina verður tú noyddur at lesa í henni.

### Gomul andaktsbók

Historie om det evige liv er skrivað av einum týskara, og hon er útgivin í Danmark í 1640. Henda bók er ein gomul andaktsbók, og tað eru fleiri bøkur av slíkum slagi í Føroyum, og Ólavur sigur, at hon er ikki nógv verd, men heilt avgjørt stuttlig at eiga.

Niels Pauli Danielsen, prestur, veit at siga frá, at slíkar bøkur vórðu brúktar at lesa úr heima við hús.

–Fyrr í tíðini vóru fólk nógv heima, á bóndagarði ella líknandi, og tá savnaðust tey til lestur í húsinum einaferð um dagin saman við húskallum og arbeiðskonum, og tá lósu tey úr andaktsbók, greiðir Niels Pauli Danielsen frá.

–Luther hevði eina bók, sum hann kallaði Husandagter, og er hon skrivað júst til hetta brúkið. Hetta er ein gamal katólskur siður, sum hevur sitið fastur í føroyingum í nógv ár. Eg veit framvegis um fólk, sum lesa lestur heima ístaðin fyri at fara í kirkju.

Niels Pauli sigur, at søgurnar siga, hvussu fastur kristindómurin er grógvin í fólk, og hetta er ein leivd frá gamlari tíð. Andaktsbøkurnar eru nógvar, men sjálvur hevur hann ikki hoyrt um júst hesa hjá Ólavi.